Vend

# Heildarætlan um kynsligan ágang

Almannamálaráðið
www.amr.fo

# Allýsing Sameindu Tjóða:

Kynslig misnýtsla (sexual exploitation) merkir bæði framdur og tilætlaður ágangur av kynsligum slag í førum, har ofrið er viðbrekið, í veikari støðu ella undirgivið misnýtaranum. Kynslig misnýtsla fevnir eisini um føri, har fyrimunur av fíggjarligum, sosialum ella politiskum slag fæst burtur úr misnýtsluni.

Kynsligur ágangur (sexual abuse) merkir bæði tvingsil og hóttan um tvingsil av kynsligum slag, sama um talan er um beinleiðis valdsnýtslu, ójavna støðu ella hóttanir. [1]

[1] Kelda: UN Secretary-General's Bulletin on protection from sexual exploitation and abuse (PSEA) (ST/SGB/2003/13: http://www.un.org/en/pseataskforce/overview.shtml

# Innihaldsyvirlit

Allýsing Sameindu Tjóða: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 1
Innihaldsyvirlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 2
Formæli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3
Heildarætlan um kynsligan ágang . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
Kynsligur ágangur – almenna søgan er stutt . . . . . . . . . . . . . . . 5
Í øllum samfelagsbólkum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
Bøtandi hond . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Lanzarotesáttmálin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Átøkini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
Kostnaður í alt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Átak 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
Átak 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
Átak 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
Átak 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
Átak 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Átak 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Átak 7 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
Átak 8 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
Barnaváttanir og fyrningarfreist . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
Eftirmeting av átøkunum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
Útgangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20
Hesi hava givið arbeiðsbólkinum sítt íkast . . . . . . . . . . . . . . . 20

# Formæli

At kynsligur ágangur og siðamisbrot fara fram í Føroyum – eins og aðra staðni – vita vit.

Hesin ágangur er trupul at tosa um. Hann fer fram í loyndum og ofta eru tað fólk, sum vit hava álit á, sum fremja ágangin. Júst hetta ger, at ágangurin er so serliga svárur og trupul at tosa um.

Eg gleðist tó um, at seinnu árini hevur verið tosað meira um kynsligan ágang, enn nakrantíð áður. Í dag kunnu vit tosa opið um viðurskifti, sum fyri fáum árum síðani ikki vórðu tikin uppá tungu – og als ikki í almenna rúminum. Hesin opinleiki hevur ivaleyst havt við sær, at fleiri, sum hava verið fyri kynsligum ágangi, hava fingið dirvi til at siga frá ágangtinum og at leita sær hjálp.

Eg eri sannførd um, at eins og tá ið talan er um annan harðskap, er tað ógvuliga týdningarmikið, at vit tora at seta orð á hesi viðurskifti. Tí hava kunning, upplýsing og opinleiki eisini fingið nógva rúmd í teimum átta ítøkiligu átøkunum í hesi ætlan.

Síðan á vári 2012 hevur verið arbeitt við at seta í verk átøkini í Heildarætlanini um harðskap í parløgum og nærsambondum. Í teirri ætlan er harðskapur allýstur í breiðastu merking, og fevnir tískil eisini um kynsligan harðskap. Við Barnahúsinum, sum lat upp í desember 2013, hava vit styrkt um fyribyrging og tilbúgving, tá ið talan er um børn, sum eru fyri kynsligum ágangi og harðskapi annars.
Løgtingið hevur mett, at neyðugt var at gera eina serliga heildarætlan um kynsligan ágang.

Tað eri eg sum landsstýriskvinna í almannamálum, sum havi ábyrgdina av at gera hesa ætlan og leggja hana fyri Løgtingið, eins og eg havi ábyrgdina av Heildarætlanini um harðskap í nærsambondum.

Henda nýggja heildarætlan fevnir um átta átøk, sum arbeiðsbólkurin hevur mett kunnu setast í verk yvir eitt trý ára skeið, saman við og í framhaldi av Harðskaparætlanini.

Kynsligur ágangur skal ongantíð góðtakast, og málið hjá okkum má vera, at í Føroyum skal eingin vera fyri kynsligum ágangi. Og fyri tey, sum hava verið fyri ágangi, eiga vit at gera alt, vit eru før fyri, til tess at bøta um árinini.

Vón mín er, at tey átta átøkini í hesari ætlan skulu virka fyri hesum máli.

Átøkini eru, hvørt á sínum øki, umráðandi at fáa sett í verk, eg vóni , at Løgtingið tekur væl ímóti hesum, og samtykkir at farast kann undir at seta Heildarætlanina og átøkini í henni í verk, eins og uppskotið mælir til.

19. mars 2015
**Annika Olsen**
landsstýriskvinna
í almannamálum

# Heildarætlan um kynsligan ágang

## Arbeiðsbólkur:

*Elin Winther Poulsen, Almannamálaráðið, forkvinna*
*Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, Løgmansskrivstovan*
*Hildur Patursson, Mentamálaráðið*
*Símun J. Hansen, Heilsumálaráðið*
*Oddbjørg Balle, Kommunufelagið*

Løgtingið hevur einmælt samtykt, at landsstýrið skal gera eina heildarætlan um kynsligan ágang. Henda ætlan skal staðfesta, hvørji átøk eru neyðug til tess at fyribyrgja og viðgera kynsligan ágang (Uppskot til samtyktar, løgtingsmál 54/2012). Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum eisini samtykt, at Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum skal víðkast til at fevna um kynsligan ágang. [2]

Í uppskotinum til samtyktar verður arbeiðið við Heildarætlanini um harðskap í parløgum og nærsambondum (hereftir: Harðskaparætlanin) ítøkiliga nevnt, og skotið verður upp at nýta hetta arbeiðið sum leist at leggja til rættis heildarætlanina um kynsligan ágang.

Harðskaparætlanin allýsir harðskap í breiðastu merking, og fevnir harvið eisini um kynsligan harðskap/ágang.
Síðani á vári í 2012 hevur verið arbeitt ítøkiliga við at seta í verk tey átjan átøkini í Harðskaparætlanini, og stórur dentur hevur verið lagdur á upplýsing og kunning. Eftirsum Harðskaparætlanin, sum nevnt omanfyri, eisini snýr seg um kynsligan harðskap, hevur nógv verið gjørt burturúr at kunna og upplýsa um júst hetta slagið av harðskapi.

Á øllum teimum kunningarfundum, sum hava verið kring landið undir heitinum „Sig frá", hevur eins nógv verið tosað um og kunnað um kynsligan ágang, sum um annan harðskap. Hesir kunningarfundir eru blivnir afturvendandi tiltøk, sum vera á skrá hvørt ár.

Flestu av átøkunum í Harðskaparætlanini hava neyvt sama innihald, uttan mun til hvat slag av harðskapi, talan er um.

Tó má staðfestast, at nøkur øki, sum serliga eru viðkomandi, tá ið talan er um kynsligan ágang, *ikki* eru umrødd í Harðskaparætlanini, og eiga tí at verða løgd afturat.

Tað verða tey við hesari heildarætlan:

**Heildarætlan um kynsligan ágang.**

**Staðfest verður tí, at:**

- Heildarætlanin um harðskap í parløgum og nærsambondum fevnir um allan harðskap, og tí eisini um kynsligan ágang
- Nøkur øki, sum snúgva seg júst um kynsligan ágang, vanta í omanfyri nevndu ætlan.

**Heildarætlan um kynsligan ágang** verður tí løgd afturat **Harðskaparætlanini**, tó sum ein sjálvstøðug heildarætlan. Báðar heildarætlanirnar hanga, við øðrum orðum, natúrliga saman. Víst verður á, at Harðskaparætlanin snýr seg um harðskap í *parløgum og nærsambondum*, meðan Heildarætlan um kynsligan ágang snýr seg um kynsligan ágang *alla* staðni í samfelagnum, og ikki einans í nærsambondum.

Heildarætlanin um kynsligan ágang nevnir tey ítøkiligu átøkini, sum vanta í Harðskaparætlanini, og sum kunnu setast í verk so skjótt, sum peningur er játtaður.

Við á henda hátt at knýta báðar heildarætlanirnar saman, verða peningur og orka nýtt á skilabesta hátt: Heldur enn til at endurskapa tey átøk, sum longu eru og virka til fulnar, kunnu orka og peningur koma teimum tilgóðar, sum hava tørv á viðgerð og hjálp.

Í hesari ætlan eru sostatt átta ítøkilig átøk at seta í verk komandi trý árini.

Harumframt verður greitt frá um barnaváttanir og fyrningarfreist, sí síðurnar 28-31.

Kostnaðurin av at seta í verk tey átta átøkini er mettur til 4,8 milliónir krónur íalt, býtt á árini 2016, 2017 og 2018, sí talvu á síðu 14. Tað er ymiskt, hvussu nógv tey einstøku átøkini kosta at seta í verk.

Vilja vit gera nakað munagott til tess at basa kynsligum ágangi, og til tess at hjálpa teimum, sum eru rakt, krevur hetta raðfestingar, undir hesum eisini fíggjarligar raðfestingar.

Royndir og kanningar aðrastaðni vísa, at samfelagið sparir henda pening innaftur. Peningur verður spardur eitt nú í sjúkradøgum, innleggingum, viðgerðum og stuðli av ymsum slag, eins og til serlig átøk innan skúlagátt til børn, sum ikki trívast og tí ikki læra tað, tey eiga.

Peningurin, sum settur verður av til átøkini í hesari heildarætlan eigur tí ikki síggjast sum ein útreiðsla fyri samfelagið, men hinvegin sum ein skilagóð og neyðug íløga, sum fer at verða afturgoldin fleiri ferðir.

[2] http://www.lms.fo/kunning/tidindi/samgonguskjalid-hja-abdh/

# Kynsligur ágangur – almenna søgan er stutt

Tað er ein sannroynd, at kynsligur ágangur og siðamisbrot fara fram í Føroyum, eins og alla aðrastaðni, og tað er týdningarmikið, at almennu Føroyar viðurkenna, at tað er ein samfelagsábyrgd at basa hesum trupulleika.

Á fundi í Norðurlandahúsinum 25. november 2010[3] var breið politisk semja um, at ein heildarætlan skuldi gerast at basa harðskapi í parløgum og nærsambondum. Ein ætlan, sum viðger trupulleikar, sum til tá ikki høvdu vakt serliga stóran, almennan ans.

Í Harðskaparætlanini eru 18 átøk, sum eru og verða sett í verk. Nú verður henda nýggja heildarætlan um kynsligan ágang løgd afturat, og fer at virka við síðuna av og saman við Harðskaparætlanini.

# Í øllum samfelagsbólkum

Kynsligur ágangur finst í øllum samfelagsbólkum og øll børn kunnu vera fyri kynsligum ágangi ella misnýtslu. Nøkur eru tó, sum eru í serligum vanda.[4]

Tað er týdningarmikið, at vit sum samfelag tora at seta orð á evnið, tí eitt, sum eyðkennir júst hetta slagið av harðskapi/ágangi er, at hann er so serliga svárur og trupul at tosa um.

Ágangurin fer fram í loyndum, og nógv eru tey, sum fara í grøvina við sínum loyndarmáli. Kanska vórðu tey hótt við, at okkurt ræðuligt skuldi henda, søgdu tey nøkrum frá tí, sum var teimum fyri. Kanska vóru tey góð við hann ella hana, sum framdi ágangin. Og kanska vóru hendingarnar so ræðuligar, at tær snøgt sagt vórðu pakkaðar burtur í undirvitskuna.

## Allýsing Sameindu Tjóða:

Kynslig misnýtsla (sexual exploitation) merkir bæði framdur og tilætlaður ágangur av kynsligum slag í førum, har ofrið er viðbrekið, í veikari støðu ella undirgivið misnýtaranum. Kynslig misnýtsla fevnir eisini um føri, har fyrimunur av fíggjarligum, sosialum ella politiskum slag fæst burtur úr misnýtsluni.

Kynsligur ágangur (sexual abuse) merkir bæði tvingsil og hóttan um tvingsil av kynsligum slag, sama um talan er um beinleiðis valdsnýtslu, ójavna støðu ella hóttanir

*Kelda: UN Secretary-General's Bulletin on protection from sexual exploitation and abuse (PSEA) (ST/SGB/2003/13*[5]

Ofta verða hendingarnar skúgvaðar til viks og ótespilig barnaminni burturskotrað, tó fyri einans at koma fram seinni í lívinum. Til dømis gerast kvinnur ofta tilvitaðar um hesi viðurskifti, tá tær eiga sítt fyrsta barn, ella í sambandi við kynsbúningina. Tí er so sera týdningarmikið, at onkur skipan er, sum kann lofta teimum, sum fáa tørv á hjálp, uttan mun til, hvussu gomul tey eru, tá ið tað gerst teimum greitt, at teimum tørvar hjálp ella tá ið tey eru tilreiðar at koma fram við sínum loyndarmáli. Í miðal eru kvinnur seinast í 30'unum, tá ið tær koma fram við slíkum loyndarmálum. Menn eru uppaftur eldri.[6]

Tá ein heildarætlan skal gerast, sum hevur til endamáls at basa hesum álvarsliga trupulleika, snýr tað seg millum annað um at bróta tøgnina, ið valdar og at skapa opinleika um hetta viðkvæma evnið. Á henda hátt verður tað lættari hjá teimum, sum hava tað fyri neyðini, at leita sær hjálp og stuðul.

[3] Amnesty International, Føroya Deild, skipaði fyri fundinum.
[4] Kristian Larsen: Senfølger af overgreb. Voksne med følger af seksuelle overgreb i barndommen – hvad er senfølgerne og hvordan kan man hjælpe? Útgávan finst á heimasíðuni hjá Servicestyrelsen.dk http://www.ptsdforum.dk/pdf/senfoelger-af-overgreb.pdf
[5] http://www.un.org/en/pseataskforce/overview.shtml
[6] Fyrilestur við Lone Lyager, viðgera, sum KRIS skipaði fyri í Hoyvíkar Kirkju, 14. okt., 2014.

Henda heildarætlan um kynsligan ágang fevnir um 8 ítøkilig átøk, sum snúgva seg um ymiskt frá upplýsing og kunning til viðgerðartilboð fyri seinárin.

Í sínum arbeiði hevur arbeiðsbólkurin havt samband við tey, sum hava vitan um evnið, sí listan á síðu 34. Vit hava fingið umboð fyri stovnar, felagsskapir eins og einstaklingar at greiða okkum frá, og hava síðani – útfrá samskiftinum við hesi – lagt okkum eftir at gera eina ætlan við átøkum, sum venda sær til borgaran, eins og til privatar og almennar felagsskapir.

Tey, sum hava verið fyri kynsligum ágangi barnaárini, stríðast ofta sum vaksin við seinárin orsakað av hesum ágangi. Tí skulu tey hava møguleika til at leita sær hjálp og viðgerð, tá ið tey kenna seg tilreiðar. Tað fyrsta átakið í hesari ætlan snýr seg um, at hesi fólk skulu hava møguleika til at leita sær ókeypis sálarfrøðiliga hjálp.

Fólk, sum hava serligan tørv, kunnu vera í serligum vanda fyri at vera fyri kynsligum ágangi[7], og hava tí serliga verju fyri neyðini. Eitt av átøkunum í hesari ætlan snýr seg um, hvussu vit kunnu bøta um viðurskiftini hjá teimum.

Ein yvirskipað tilbúgvingarætlan skal gerast, soleiðis at starvsfólk á skúlum og ansingarstovnum vita, hvussu tey skulu bera seg at, tá ið mál um kynsligan ágang stinga seg upp. Í arbeiðinum at seta í verk átøkini í Harðskaparætlanini, er stundum komið fram, at júst hesir fakbólkar sakna eina slíka ætlan.

# Bøtandi hond

Børn og ung hava rætt til eitt gott og trygt lív og tað hevur stóran týdning, at arbeitt verður við medvitinum hjá børnum okkara um teirra rættindi og rættin til at seta mørk: Hvat havi eg rætt til? Hetta er mín kroppur, eingin eigur nerta við meg, har eg ikki vil tað, o.s.fr.

Í arbeiðinum við at seta í verk Harðskaparætlanina, verður stórur dentur lagdur á at upplýsa og kunna – eisini fyri børnum. Til dømis setti Barnaútvarpið hjá Kringvarpinum harðskap á skrá um sama mundið, sum tey fyrstu átøkini í „Sig frá“ høpi byrjaðu. Hetta tí, at rætta leiðin at fara er júst at gera børn okkara varug við síni rættindi og rættin til egin mørk – bæði kropsliga og sálarliga. Hetta hevur stóran týdning, tá ið talan er um at basa kynsligum ágangi og øðrum harðskapi. Børnini skulu gerast tilvitað um støðu sína í heila tikið, bæði í samfelagnum og í familjuni. Teimum skal gerast greitt, at eingin hevur loyvi til at gera seg inn á tey, og at um tey eru fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, kunnu tey venda sær til eitt nú Barnaverndartænastuna ella onkran annan, sum tey hava álit á og fáa hjálp.

Broytingar eru at hóma hesum viðvíkjandi. Opinleikin í samfelagnum sum heild gerst alt størri og tað er „loyvt“ at tosa um viðurskifti og evni í dag, sum ikki vórðu tikin uppá tungu fyri bert fáum árum síðani. Tað er gott og vert at fegnast um.

At Barnahúsið lat dyrnar upp í 2013 er eitt stórt stig á leiðini til at styrkja og samskipa verandi tænastur. Endurskoðaða Barnaverndarlógin[8], sum m.a. hevði við sær, at fráboðanarskyldan varð herd, er eisini annað stórt stig á leiðini.

Sambært Barnabata ringja í miðal 600 børn til teirra um árið, tí teimum tørvar ráðgeving av einhvørjum slag. Av hesum 600 eru í miðal 30 børn, sum spyrja um viðurskifti, sum snúgva seg um kynsligan ágang.[9]

Harðskaparætlanin leggur, sum nevnt omanfyri, dent á, at opinleikin er týdningarmikil, og vónin er, at við tíðini gerast føroysk børn alt betri før fyri at seta mørk – eins og at virða mørk hjá øðrum.

Í arbeiðinum við at seta í verk Harðskaparætlanina verður eisini dentur lagdur á førleikamenning av teimum starvsfólkum, sum eru um børnini, tað veri seg lærarar, pedagogar og onnur.

Nógvir fundir hava verið kring landið, har pedagogar hava tikið lut, og har løgfrøðingur, sálarfrøðingur og politistur hava greitt frá. Sipað verður her til bæði tey almennu Sig frá – tiltøkini, men eisini til fundir, sum dagstovnar o.o. hava skipað fyri.

Nevnast kann harafturat, at omanfyri nevndu eisini, trý ár á rað, hava undirvíst lærara- og pedagoglesandi á Setrinum, eins og Harðskaparætlanin er løgd fram fyri lesandi á Sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingini og samskiparin hevur undirvíst lærara- og pedagoglesandi.

Tá ið talan er um kunning og upplýsing til lærarar, varð skipað fyri skeiðum kring landið um ársskiftið 2014/15, har royndur sálarfrøðingur undirvísti saman við lærarum við serligum royndum. Mentamálaráðið játtaði at frígeva lærarar frá undirvísing ein seinnapart í sambandi við hesi skeið, soleiðis at øllum lærarum stóð í boði at taka lut.

[7] http://socialstyrelsen.dk/udsatte/vold-i-familien/om-vold-i-familien/typer-af-vold-1/seksuelle-overgreb-og-personer-med-handicap
[8] http://logir.fo/system/foframe.htm
[9] Sambært samrøðu við Djóna Eidesgaard, aðalskrivara í Barnabata.

# Lanzarotesáttmálin[10]

## Europaráðssáttmálin um verju av børnum móti kynsligari misnýtslu og kynsligum ágangi

Europaráðið setti í 2006 eina nevnd at kanna, um tørvur var á altjóða reglum til tess at verja børn móti kynsligari misnýtslu og kynsligum ágangi. Longu 25. oktober 2007 varð Europaráðssáttmálin um verju av børnum móti kynsligari misnýtslu og kynsligum ágangi lagdur fram til undirskrivingar í Lanzarote í Spania. Sáttmálin verður tí vanliga nevndur Lanzarotesáttmálin.

Danmark skrivaði 20. desember 2007 undir Lanzarotesáttmálan og staðfesti hann 18. november 2009. Í sambandi við staðfestingina tók Danmark fyrivarni um, at Føroyar ikki skuldu verða fevndar av sáttmálanum, og sambært danska Løgmálaráðnum er hetta fyrivarnið ongantíð tikið aftur. Sáttmálin er sostatt ikki galdandi fyri Føroyar.

## Lúka Føroyar krøvini í Lanzarotesáttmálanum?

Verður hugt at krøvunum í Lanzarotesáttmálanum, kunnu vit siga, at Føroyar helst í størsta mun lúka hesi krøv.

Eitt fullfíggjað svar krevur tó, at galdandi lóggáva á økinum má eftirkannast og samanberast við sáttmálan á sama hátt, sum vanliga verður gjørt, tá ið talan er um at staðfesta ein altjóða sáttmála. Hetta liggur tó uttanfyri arbeiðið við hesari heildarætlan.

## Innihaldið í Lanzarotesáttmálanum - yvirlit

Her skal verða givið eitt yvirlit yvir týdningarmesta innihaldið í sáttmálanum, sum er skipaður í 13 kapitlar við 50 greinum:

**Kapittul I: Endamál**
Sambært grein 1 er endamálið við sáttmálanum a) at forða fyri og stríðast ímóti kynsligari misnýtslu og kynsligum misbrúki av børnum, b) at verja rættindini hjá børnum, ið hava verið fyri tílíkari misnýtslu, og c) at virka fyri innanlendis og altjóða samstarvi móti tílíkari misnýtslu av børnum. Sambært grein 2 eru sum børn í sáttmálahøpi at skilja persónar undir 18 ára aldur.

**Kapittul II: Fyribyrgjandi tiltøk**
Her eru reglur um útbúgving av fólki, sum arbeiða við børnum (grein 5), útbúgving av børnum í grundskúla og framhaldsskúlum at skilja vandan fyri kynsligari misnýtslu (grein 6), tiltøk mótvegis almenninginum, herundir átøk at menna tilvitskuna um tílíka misnýtslu, m.a. gjøgnum fjølmiðlarnar.

**Kapittul III: Samskipan av starvinum hjá myndugleikum, ið taka sær av verju av børnum móti misnýtslu**

**Kapittul IV: Verjutiltøk og stuðul til offur**
Her eru reglur um fráboðan, tá ið grundaður illgruni er um kynsliga misnýtslu, herundir reglur um, at tagnarskylda ikki skal forða fyri tílíkum fráboðanum (grein 12), stovnan av hjálparlinjum umvegis telefon og alnet (grein 13) og stuðul til offur (grein 14).

**Kapittul V: Uppílegging at forða fyri endurtøku av misnýtslu**
Her er ásett, at munadygg tiltøk eiga at verða skipað í lóg at forða fyri endurtøku av misnýtslu (grein 15) og at persónar dømdir fyri misbrot skulu hava atgongd til tílík tiltøk (grein 16).

**Kapittul VI: Revsilóg**
Hetta er tað størsta kapitlið við greinunum 18 til 28. Her verða krøv sett til revsilógirnar í sáttmálalondunum, tá ið tað ræður um kynsliga misnýtslu av børnum. M.a. er ásett, at londini áseta lægsta aldur á børnum, har kynslig samvera er loyvd. Somuleiðis verða ásett krøv til lóggávuna viðvíkjandi ymiskum formum fyri kynsligari misnýtslu av børnum.

Krøv verða somuleiðis sett til løgdømið, t.v.s., hvussu víða løgdømið skal verða galdandi so sum umborð á skipum og flogførum. Sum meginregla fyri áseting av revsing verður kravt, at revsingin skal vera munadygg, í samsvari við brotið og egnað til at forða fyri endurtøku.

Sum herðandi umstøður, ið lógin eigur at áseta, verða m.a. nevndar: brotsverkið hevur álvarsliga skatt likamligu ella sálarligu heilsuna hjá barninum, í sambandi við brotið er framd píning ella álvarslig valdsmisnýtsla móti barninum, barnið var serliga viðbrekið, brotsmaðurin var limur av familjuni hjá barninum ella hevði á annan hátt myndugleika yvir tí, fleiri vóru um brotið, brotsmaðurin hevði áður framt líknandi brot.

**Kapittul VII: Kanning, revsing og rættargangur**
Her eru ásettar reglur um tey serligu atlit, ið eru til barnið sum offur og vitni. Um fyrning av brotinum verður ásett, at freistin skal vera so mikið long, at neyðug tíð er til at byrja rættarmál eftir at ofrið er komið til myndugleika aldur, og at samsvar er við álvarsemið á brotinum. Krøv eru eisini til avhoyringarform og rættargangsform.

**Kapittul VIII: Upptøka og goyming av data**
Her er ásett, at neyðug tiltøk skulu verða tikin til at savna og goyma samleikan og DNA hjá persónum dømdum fyri kynslig misbrot móti børnum, við neyðugum atliti at verju av privatlívinum hjá viðkomandi.

[10] http://www.coe.int/t/dghl/standardsetting/children/default_en.asp

**Kapittul IX: Altjóða samstarv**
Her eru reglur um samstarv millum sáttmálalondini um fyribyrging av kynsmisbrotum móti børnum og stuðul til ofrini.

**Kapittul X: Eftirlit**
Skipað verður ein nevnd við umboðum úr sáttmálalondunum til at hava eftirlit við, at sáttmálin verður hildin.

**Kapittul XI: Viðurskifti við aðrar altjóða sáttmálar**
Her verður serliga víst til ST sáttmálan um rættindi barnanna. Kapitlarnir XII og XIII eru av tekniskum slagi viðvíkjandi broytingum av sáttmálanum, undirskriving og gildiskomu av sáttmálanum.

# Átøkini

Nógv ymiskt kundi verðið drigið fram, tá ið tað snýr seg um fyribyrging av kynsligum ágangi og at bøta um støðuna á hesum øki sum heild.

Hesi 8 átøkini er arbeiðsbólkurin komin til, eftir at hava samskift við nógvar ymiskar persónar og myndugleikar:

1. Viðgerðartilboð/seinárin
2. Viðgerð til teirra, sum fremja kynsligan ágang
3. Almenn kunning
4. Kynsligur ágangur á netinum – trygd á netinum
5. Tilbúgvingarætlan á stovnum/skúlum ( hvussu bera starvsfólk seg at, tá ið mál um kynsligan ágang stinga seg upp?)
6. Átøk, sum venda sær til fólk/felagsskapir, sum fáast við børn í frítíðini (skótar, ítróttur, sunnudagsskúlar, v.m.)
7. Javnbjóðis møguleikar – fólk við menningartarni ella sálarligum avbjóðingum.
8. Kunning til foreldur/børn.

# Kostnaður íalt:

| | | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Viðgerðartilboð til teirra, sum hava seinárin orsakað av kynsligum ágangi barnaárini | 1.000.000 | 1.000.000 | 1.000.000 |
| 2. | Viðgerð til teirra, sum fremja kynsligan ágang | 120.000 | 120.000 | 120.000 |
| 3. | Almenn kunning | 120.000 | 120.000 | 120.000 |
| 4. | Kynsligur ágangur á netinum – trygd á netinum | | 100.000 | 100.000 |
| 5. | Tilbúgvingarætlan á stovnum/skúlum (hvussu bera starvsfólk seg at, tá mál um kynsligan ágang stinga seg upp?) | - | 120.000 | 100.000 |
| 6. | Átøk, sum venda sær til fólk/felagsskapir, sum fáast við børn í frítíðini (skótar, ítróttur, sunnudagsskúlar) | 150.000 | - | 50.000 |
| 7. | Javnbjóðis møguleikar | 100.000 | 200.000 | 50.000 |
| 8. | Kunning til foreldur/børn | | 80.000 | 30.000 |
| | **Tilsamans** | **1.490.000** | **1.740.000** | **1.570.000** |

# Átak 1:

**Viðgerðartilboð til teirra, sum hava seinárin orsakað av kynsligum ágangi barnaárini**

- Tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til vaksin, sum hava seinárin orsakað av kynsligum ágangi barnaárini.
- Mettur kostnaður: 1.000.000 krónur um árið.
- Ábyrgd: Almannamálaráðið.

## Tilboðið

Vaksin fólk, sum stríðast við seinárin, tí tey vóru fyri kynsligum ágangi barnaárini, skulu hava rætt til ókeypis viðgerð hjá sálarfrøðingi.

Sambært átakinum skal peningur játtast, soleiðis at hesi fólk, tá ið tey hava tørv á tí, kunnu venda sær beinleiðis til ein sálarfrøðing.

Tað verða løggildir sálarfrøðingar, sum fara at veita viðgerðina og játtast kunnu 12 viðgerðartímar. Tað er týdningarmikið, at fólk hava fleiri sálarfrøðingar at velja ímillum, soleiðis at øll hava møguleika til at finna sær júst tann rætta. Hetta kann serliga vera týdningarmikið fyri fólk, sum hava verið fyri ágangi, og sum tí eru í einari svárari støðu og kunnu vera viðkvom. Viðgerðin kann verða skipað sum einstaklinga-, par- ella bólkaviðtala. Hetta er eftir meting hjá sálarfrøðinginum. Á heimasíðuni hjá Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar er listi við sálarfrøðingum, sum bjóða viðgerð í Føroyum, sí psykolog.fo.[11]

Felagsskapurin KRIS[12] hevur í nógv ár veitt hjálp og stuðul til vaksin, sum hava seinárin.

Harumframt ber til hjá fólki, sum eru yngri enn 25 ár, og sum hava verið fyri kynsligum ágangi barnaárini, at fáa fíggjarligt ískoyti frá Heilsutrygd til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi, sí frágreiðing niðanfyri.

Hetta nýggja tilboðið kemur nú afturat og frameftir eru sostatt trý tilboð:
Tilboðið um ískoyti frá Heilsutrygd til sálarfrøðiliga viðgerð til fólk, yngri enn 25 ár, tilboðið hjá KRIS, umframt almenna viðgerðartilboðið sambært hesari heildarætlan, har tilber at fáa ókeypis viðgerð hjá útbúnum sálarfrøðingi.

## Tørvurin

Trupult er at vísa á nágreinilig tøl, tá ið tað ræður um at meta um tørvin á viðgerð. At hava verið fyri kynsligum ágangi hevur sálarligar avleiðingar við sær, eisini fleiri ár eftir ágangin. Tað er ein sannroynd, at ilt er at siga nøkrum frá tí, ið er hent, og trupult er tí eisini at biðja um hjálp.

Ein norsk kanning, har 7.033 miðnámsskúlanæmingar vórðu spurdir, vísir, at 22 prosent av gentunum og 8 prosent av dreingjunum høvdu verið fyri „mildt seksuelt overgrep“, meðan 15 prosent av gentunum og 7 prosent av dreingjunum høvdu verið fyri álvarsligari kynsligum ágangi.[13]

Sambært danska Socialstyrelsen, vóru í 2012 íalt 2.096 áheitanir frá fólki, sum antin sjálvi høvdu verið fyri kynsligum ágangi, ella sum høvdu tætt samband við fólk, sum høvdu verið fyri slíkum ágangi og sum høvdu tørv á ráðgeving.[14]

Í Føroyum finnast ikki almenn tøl, men umboð fyri felagsskapin KRIS hava á fundi við arbeiðsbólkin greitt frá, at vanliga hevur felagsskapurin fingið 50 nýggjar áheitanir um árið, meðan nýggjastu tølini hinvegin vístu, at longu í mai mánaði 2014 vóru 55 nýggjar áheitanir komnar. Hesi tøl benda sostatt á ein vaksandi tørv á viðgerð og hjálp fyri seinárin.

Umboð fyri løgregluna í Føroyum vóru eisini á fundi við arbeiðsbólkin. Tey greiddu frá, at millum 50 og 60 mál um kynsligan ágang verða meldað til løgregluna á hvørjum ári. Í 2014 vórðu 52 mál um kynsligan ágang meldað til løgregluna í Føroyum. Her var talan um ymisk mál frá blygnaðarskemd til framda samlegu.

Talan er um ágang á bæði børn og vaksin. Og vit eiga at minnast til, at sambært løgregluni hava fleiri av teimum, sum verða meldað, gjørt seg inn á fleiri fólk, og skal hetta talið tí fleirfaldast til tess at meta um, hvussu nógv í veruleikanum eru fyri kynsligum ágangi.

Sostatt verður mett, at fráboðanirnar eru umleið 100 um árið. Havast skal í huga, at hetta eru einans nýggjar fráboðanir og arbeiðsbólkurin metir, at talið er lágt sett. Til dømis hava vit ikki lagt upp fyri myrkatølum, hóast bæði løgreglan og KRIS hava gjørt vart við, at slík ivaleyst eru á hesum øki.[15]

Tað er ilt at meta um, hvussu nógv hava tørv á einum viðgerðartilboði fyri seinárin. Tí hóast vit vita, hvussu nógv mál verða meldað til løgregluna og hvussu nógv leita sær hjálp hjá KRIS, eru tey helst nógv, sum ikki tora ella megna at leita sær hjálp.

[11] http://www.psykolog.fo/
[12] http://kris.fo/default.asp
[13] http://www.nova.no/asset/3059/1/3059_1.pdf
[14] http://shop.socialstyrelsen.dk/products/arsstatistik-2012-statistik-om-centre-der-arbejder-med-senfolger-efter-seksuelle-overgreb
[15] Myrkatøl eru tøl fyri brotsverk, sum ikki verða fráboðað ella meldað, og sum tí ongantíð gerast alment kend.

Sambært hesum átaki verður skotið upp, at eitt viðgerðartilboð verður boðið teimum, sum hava seinárin. Tilboðið verður alment og ókeypis, og tað verða løggildir sálarfrøðingar, sum veita viðgerðina. Tað skal bera til at fáa játtað 12 viðgerðir hjá sálarfrøðingi.

## Ískoyti frá Heilsutrygd til sálarfrøðiliga viðgerð

Heilsutrygd veitir fólki, sum eru yngri enn 25 ár, og sum hava verið fyri kynsligum ágangi barnaárini, ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð.
Sambært kunngerð nr. 150, frá 6. desember, 2011 um fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi, ber til hjá fólki, sum hava verið fyri kynsligum ágangi, áðrenn tey fyltu 18 ár, at fáa hetta ískoytið, tó einans til tey fylla 25 ár. Funnist hevur verið at 25 ára aldursmarkinum, tí fólk eru ofta nógv eldri, tá ið tey leita sær hjálp fyri seinárin. Í miðal eru kvinnur seinast í 30'unum, og menn uppaftur eldri, sí eisini fótnotu 6.

Tá ið lækni hevur ávíst borgara til viðgerð hjá sálarfrøðingi, letur Heilsutrygd ískoyti til viðgerðina. Ískoytið, sum Heilsutrygd veitir, er 40 prosent av kostnaðinum, meðan viðkomandi skal rinda hini 60 prosentini sjálv/ur.

## Neyðug játtan

Av tí, at talan er um eitt nýtt tilboð, er ilt at meta um kostnaðin. Myrkatøl eru (sí fótnotu 15) eins og takstirnir broytast við tíðini.

Við støði í kostnaðinum fyri ein viðgerðartíma sambært sáttmála við Heilsutrygd[16] og útfrá einari heildarmeting annars, mælir arbeiðsbólkurin til, at ein millión krónur verður játtað um árið til viðgerðartilboð fyri seinárin.[17]

## Viðgerð er alneyðug

Fyri nógv vaksin fólk, sum dragast við seinárin orsakað av kynsligum ágangi í barndóminum, er talan um ein óberandi tungan førning av skomm, ótta, vónloysi og trupulleikum í sambandi við bæði familjulívið og arbeiðslívið. Tí er tað sera týdningarmikið, at tey fáa møguleika til at leita sær hjálp og sálarfrøðiliga viðgerð.

Hvussu nógv hesir trupulleikar ávirka lívið hjá tí rakta er ymiskt, men ofta hava teir við sær eina vánaliga lívsgóðsku. Úteftir ber kanska til at liva eitt vanligt lív, hóast ósjónligu sárini eru trupul at liva við: Ein kensla av einsemi. Vantandi sjálvsálit, vantandi álit á medmenniskjum eru millum trupulleikarnar.

Seinárin kunnu eisini gera tað trupult við at finna seg til rættis á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum annars, sí niðanfyri. Í 2013 lótu í Danmark upp tríggjar nýggjar miðstøðir fyri vaksin, sum hava seinárin, orsakað av kynsligum ágangi barnaárini.

Talan er um ókeypis tilboð, og miðstøðirnar húsast í Keypmannahavn, Odense og Århus. Til ber at fáa ráðgeving, einstaklinga viðgerð, bólkaviðgerð eins og ráðgeving um sosial viðurskifti annars.

Av teimum, sum fáa viðgerð á miðstøðunum, eru 83% kvinnur og 17% menn. Miðalaldurin á øllum brúkarum var í 2012 38 ár. Kvinnurnar vóru í miðal 37 ár og menninir 43 ár.[18]

Tøl frá danska Socialstyrelsen vísa, at vaksin fólk, sum dragast við seinárin orsakað av kynsligum ágangi barnaárini, í størri mun eru uttanfyri arbeiðsmarknaðin, enn onnur.

Brúkararnir greiða eisini frá, at tey hava trupulleikar við kynslívinum, hava trupult við at seta mørk, eins og tey kensluliga kunnu vera sera óstøðug. Og fleiri, enn 50 prosent greiða harafturat frá, at tá ið tey fóru í viðgerð av fyrstan tíð, høvdu tey trupulleikar í mun til egnan kropp, angist og konsentratións trupulleikar eins og tey flestu eisini høvdu trupulleikar í samlívinum við hjúnafelagan/makan.

Hesi tølini fevna um vaksin, sum brúka omanfyri nevndu almennu, donsku viðgerðartilboðini.

**Seinárin orsakað av kynsligum ágangi eru sálarligir og sosialir trupulleikar, sum vísa seg hjá vaksnum, sum hava verið fyri kynsligum ágangi sum børn.**

[16] http://www.psykolog.fo/fileadmin/psykolog/myndir/studul/Stilling_takstir_salarfroedingar_2014__1_.pdf
[17] Sambært sáttmála millum felagið hjá føroyskum sálarfrøðingum og Heilsutrygd, kostar ein einstaklingaviðgerð 748 krónur hvørja ferð.
Sambært Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, kostar ein einstaklingaviðtala hjá privatpraktiserandi sálarfrøðingi uttan sáttmála við Heilsutrygd millum 900 og 1000 krónur.
[18] http://shop.socialstyrelsen.dk/products/arsstatistik-2012-statistik-om-centre-der-arbejder-med-senfolger-efter-seksuelle-overgreb

# Átak 2:

**Tilboð um hjálp til teirra, sum fremja kynsligan ágang**

- Sálarfrøðilig ráðgeving/viðgerð.
- Mettur kostnaður: 120.000 krónur um árið (umframt 160.000 krónur í Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum, átak 17).
- Ábyrgd: Almannamálaráðið.

Sambært átaki 17 í Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum er eitt viðgerðartilboð sett á stovn til teirra, sum fremja harðskap.

Endamálið við hesum tilboði er, at tey, sum hava harðligan atburð móti sínum næstu, kunnu fáa hjálp og amboð til at steðga við harðliga atburðinum.

Sum áður nevnt fevnir Harðskaparætlanin um allan harðskap og tí eisini um kynsligan ágang, og hetta tilboðið, átak 17, vendir sær sostatt eisini til teirra, sum fremja kynsligan harðskap/ágang.

Ein sálarfrøðingur tekur sær av viðgerðartilboðnum, og lýst verður fyri tí við lýsingarfilmi, á portalum og við faldara.

Viðgerðartilboðið verður, sum nevnt, longu boðið út sambært átaki 17 í Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum. Tó er týdningarmikið, at kunnað verður væl og alla tíðina um tilboðið.

Neyðugt er tí við fígging til støðuga og áhaldandi upplýsing og kunning.

Tilboðið sambært átaki 17 í Harðskaparætlanini, fevnir eisini um telefonráðgeving. Tað ber til at ringja ónevnd/ur og biðja um vegleiðing og ráðgeving.

Sexologisk Klinik í Region Hovedstadens Psykiatri og danska Red Barnet fóru í 2013 undir eitt upplýsingarátak um ráðgevingar- og viðgerðartilboð til fólk, sum hava kynsligar tankar um børn, pedofil.[19]

Átakið skal eggja vaksnum, sum hava kynsligar tankar um børn, til at leita sær hjálp gjøgnum eina anonyma telefonráðgeving.

Hildið verður, at kynsligur ágangur á børn kann steðgast, um potentiell gerningsfólk fáa røttu hjálpina rættstundis, og tey kunnu ringja dulnevnd til ráðgevingina á Sexologisk Klinik, og tosa við sálarfrøðingar ella læknar á klinikkini. Haðani kunnu tey so verða ávíst til ymisk viðgerðartilboð. Talan kann t.d. vera um sálarfrøðiligar samrøður. Á henda hátt ber til at hjálpa hesum fólkunum til at fáa skil á sínum tonkum, soleiðis at teir ikki føra til ágang á børn.

Her í Føroyum ber nú eisini til at fáa sálarfrøðiliga viðgerð við at ringja 52 50 00.[20]

Til viðgerðartilboðið sambært átaki 17 í Harðskaparætlanini, eru 160.000 krónur settar av árliga.

Peningurin, sum verður settur av sambært átaki 2 í Heildarætlan um kynsligan ágang, 120.000 krónur, verður serliga nýttur til at gera lýsingar, sum røkka júst teimum, sum hava trupulleikar við kynsligum ágangi og sum vilja hava hjálp.

# Átak 3:

**Almenn kunning ( millum annað um fráboðanarskylduna )**

- Almenningurin skal áhaldandi kunnast um kynsligan ágang, millum annað um skylduna, vit øll hava til at boða myndugleikunum frá, gerast vit stúrin um eitt barn.
- Mettur kostnaður: 120.000 krónur um árið.
- Ábyrgd: Almannamálaráðið í samstarvi við Barnaverndarstovu Føroya.

Tað er so ómetaliga týdningarmikið, at ljós alla tíðina verður varpað á tey skaðiligu árin, kynsligur ágangur hevur – bæði á børn og vaksin. Stóra og áhaldandi arbeiðið at kunna og upplýsa, sum byrjaði við Harðskaparætlanini, má tí halda fram. Neyðugt er, at kunningin er reglulig og áhaldandi, og ikki bert sæst sum ein tilvildarlig lýsing av og á.

Kunningartilfarið skal eisini dagførast alla tíðina og endurnýggjast so hvørt.

[19] http://www.psykiatri-regionh.dk/menu/Centre/Psykiatriske+centre/Psykiatrisk+Center+Kobenhavn/Center/Undersoegelse+og+behandling/Afdelinger+og+klinikker/bryd_cirklen/
[20] http://www.amr.fo/arbeidsoki/hardskapur-i-parlagi/vidgerdartilbod/

Umframt foreldrafundir, ráðleggingardagar, undirvísing, o.tíl. hava vælvitjaðu Sig frá tiltøkini gjørt mun. Nógv fólk kring landið alt hava fingið høvi til at kunna seg um kynsligan ágang og harðskap annars.

Nógv hevur verið gjørt við at kunna um herdu fráboðanar-skylduna á teimum mongu Sig frá-tiltøkunum. Hetta evnið hevur verið á skrá hvørja ferð, og royndirnar eru, at nógv verður spurt og kjakast um júst hetta evnið.

Tað vísir seg , at fólk – almenningurin, eins og fakfólk á t.d. ansingarstovnum og skúlum – framvegis hava nógv at spyrja um hesum viðvíkjandi.

Tað er so ómetaliga týdningarmikið fyri, hvussu vit fáa vart okkara børn og loftað teimum, sum eru fyri ágangi og/ella harðskapi, at øll fólk vita nágreiniliga, hvussu tey eiga at bera seg at, tá tey gerast stúrin um eitt barn.

Tí heldur arbeiðsbólkurin, at tað framvegis er neyðugt – áhaldandi – at varpa ljós á hesar spurningar. Hetta kann gerast við almennum fundum, lýsingum í talgildum miðlum, í bløðum, í sjónvarpi o.s.fr. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Barnaverndarstovu Føroya, BVS. Tað er eisini týdningarmikið, at fígging er, sum ger tað gjørligt at fara kring landið, bæði á umbidnar foreldrafundir, ráðleggingardagar o.tíl. eins og at skipa fyri almennum tiltøkum.

Eftirsum vit rokna við, at vælvitjaðu Sig frá– tiltøkini fara at halda áfram, vilja vit minna á, at tað er av alstórum týdningi, at kunning um fráboðanarskylduna verður á skrá hvørja ferð.

### Kunningartilfar til teirra, sum hava verið fyri neyðtøku/roynd

Ein faldari eigur at verða gjørdur, sum kann liggja alment frammi, og sum løgreglan, starvsfólk á skaðastovuni og onnur kunnu vísa til.

Á faldaranum skulu vera upplýsingar um, hvagar til ber at venda sær, hvussu ein best tryggjar prógv, hvar og hvussu ein kann leita sær sálarfrøðiliga hjálp, v.m.

# Átak 4:

**Kynsligur ágangur á netinum / trygd á netinum**

- Kunningarátøk og –tilfar.
- Mettur kostnaður: 100.000 krónur í 2017 og 10.000 krónur í 2018.
- Ábyrgd: Almannamálaráðið, møguliga í samstarvi við SSP.

SSP og Dátueftirlitið hava í felag gjørt undirvísingartilfar, sum er hóskandi til næmingar í 4. flokki.

SSP arbeiðir framhaldandi miðvíst við at gera tað trygt hjá børnum at ferðast á netinum og á sosialu miðlunum. Átakið hjá SSP, sum fyrst og fremst vendir sær til børn í 4. flokki og foreldur teirra, kallast **Tryggari á netinum.**

SSP arbeiðir í løtuni við at gera ein faldara, sum kallast „Tal-gildur trivnaður á netinum."

Hildið verður tó, at hesin trupulleikin er vaksandi, og at enn meira eigur at verða gjørt til tess at tryggja, at børn okkara læra at ferðast trygt á netinum. Hetta eigur at verða gjørt gjøgnum allan uppvøksturin, eftirsum tørvurin á upplýsing og fyribyrging er ymiskur, alt eftir, hvussu gamalt og búgvið barnið er.

Til dømis halda umboð fyri løgregluna, at børnini eru yngri og yngri, tá ið tey fáa eina óhepna atferð og stórar avbjóðingar á netinum. Tí skal aldurin setast niður í mun til upplýsing. Tað er eisini týdningarmikið, at foreldrini verða tikin upp í fyribyrging-ararbeiðið, serliga tí vit vita, at børnini eru heilt smá, tá hetta gerst viðkomandi.

Sum ein løgreglumaður segði: *Hetta er eitt nýtt slag av misnýtslu!*

Vit eiga at styrkja og útbyggja fyribyrgingararbeiðið í sambandi við trygd á netinum, og til hetta arbeiðið er neyðugt at játta pening til upplýsandi átøk og tilfar. Til dømis kunnu foreldur verða boðin til fyrilestrar at kunna seg um hesi viðurskifti.

Tá sammett verður við tilfar og faldarar, sum eru gjørd í øðrum høpi, verður mett, at ein hóskandi upphædd er 100.000 krónur um árið, tó ikki tað fyrsta árið, sum verður brúkt til fyrireiking.

# Átak 5:

**Tilbúgvingarætlan á stovnum/skúlum**

- Starvsfólk á stovnum/skúlum skulu hava greiðar leiðreglur fyri, hvussu farast skal fram í málum um kynsligan ágang.
- Mettur kostnaður: 120.000 í 2017, 100.000 í 2018.
- Ábyrgd: Mentamálaráðið og Almannamálaráðið.

Tá ið mál um kynsligan ágang stinga seg upp í skúlum ella á stovnum, er týdningarmikið, at starvsfólk vita, hvussu farast skal fram: Hvør ger hvat, hvussu og nær?[21]

Frætta foreldur til dømis í miðlunum um, at eitt mál um kynsligan ágang er aktuelt á skúlanum hjá teirra barni, gerast tey ótrygg, um tey ikki fáa rætta kunning rættstundis.

Allir skúlar og stovnar skulu tí hava greiðar mannagongdir at ganga eftir.
Arbeiðsbólkurin hevur t.d. tosað við ein skúlastjóra, sum hevur havt eitt mál um kynsligan ágang í sínum skúla. Hesin stjórin kendi seg ótryggan, og avbjóðingarnar vóru millum annað:

Hvør skal kunnast? Hvør skal siga hvat við hvønn? Hvussu skal málið kunnast, uttan at tað elvir til órógv og ótryggleika?

Skipanir úr øðrum londum eru, sum kunnu týðast og lagast til føroysk viðurskifti. Í sambandi við, at Barnahúsið lat upp, gjørdi Barnaverndarstovan t.d. ymiskt tilfar. Millum annað hava tey arbeitt við at tillaga eina tilbúgvingarætlan hjá danska Service-styrelsen. Hetta er tilfar, sum kann nýtast sum íblástur.

Mannagongdirnar kundu t.d. verðið gjørdar í samstarvi millum Almannamálaráðið og Mentamálaráðið, og síðani sendar øllum skúla- og stovnsleiðarum at seta í verk og taka í nýtslu. Á henda hátt hevur Mentamálaráðið yvirskipaðu ábyrgdina og kann tryggja, at allir skúlar hava somu ætlan innan økið.

Fíggingin er, umframt arbeiðstímar í Mentamálaráðnum og Almannamálaráðnum, til framleiðslu, prent, o.tíl. Henda játtan er 120.000 krónur í 2017, og síðani 100.000 krónur í 2018 til eftirmeting og endurprent umframt møguligt skeiðsvirksemi.

# Átak 6:

**Átøk, sum venda sær til leiðarar/fólk/felagsskapir, sum fáast við børn í frítíðini (skótar, ítróttur, sunnudagsskúlar, v.m.)**

- Skeið/førleikamenning fyri ítróttarvenjarar og leiðarar í frítíðarvirksemi annars. Tilfar sum t.d. faldarar um kynsligan ágang og fyribyrging.
- Mettur kostnaður: 150.000 krónur í 2016. 50.000 krónur í 2018.
- Ábyrgd: Almannamálaráðið – í samstarvi við Ítróttarsamband Føroya, ÍSF, og Føroya Ungdómsráð, FUR.

## Skeið og tilfar

Hugsanin er, at skeið verða hildin fyri øllum leiðarum av frítíðarvirksemi, tað veri seg innan ítrótt, hjá skótunum, í sunnudagsskúlanum, o.s.fr. Skeiðini kunnu verða skipað nøkulunda sum kunningarátøkini í Harðskaparætlanini, har sálarfrøðingur, løgfrøðingur og politistur taka lut.

Ein møguleiki er, at skeið verða skipað, t.d. 2-3 tímar um kvøldið, eftirsum flestu venjarar og leiðarar hava annað arbeiði í dagtímunum. Hetta kundi samskiparin í Almannamálaráðnum gjørt, innan karmarnar í Harðskaparætlanini, átak 15, saman við ÍSF. Løgfrøðingur, sálarfrøðingur og samskipari taka lut (eins og Sig frá – átøkini).

ÍSF kundi so boðað frá, at øll tey, ið vilja vera venjarar/leiðarar í limafeløgunum, innan eina ávísa tíð skulu fara á hetta skeið. Somuleiðis kundi man mælt til, at øll tey, sum eru leiðarar í frítíðarvirksemi annars, luttaka á skeiðinum.

Fyrsta árið, 2016, skal harafturat framleiðast hóskandi tilfar, møguliga tillagast úr útlendskum.

Týðing, uppseting, sniðgeving, prent o.a.: 150.000 krónur. Síðani eftirmeting og møguligt endurprent í 2018: 50.000 krónur.

## Støðan í Føroyum

Eins í samfelagnum annars hendir tað seg, at ítróttarvenjarar og leiðarar í frítíðarfelagsskapum gera seg kynsliga inn á børn. Hetta átakið snýr seg um upplýsing – bæði til børnini og til leiðararnar, sum skulu brynjast til arbeiðið, sum tey gera í frítíðini.Í ÍSF hava tey ymiskt tilfar á donskum máli. Tey gera

[21] Gev gætur, at her verður ikki sipað til fráboðanarskylduna, starvsfólk hava, gerast tey stúrin um eitt barn, men heldur um yvirskipaðar vegleiðingar til skúlaleiðslur.

longu eitt gott og miðvíst arbeiði innan økið sum heild, og vilja fegin samstarva um hetta.

Leguhúsið í Nesvík hevur á sínari heimasíðu eina leiðbeining um fyribyrging av kynsligum ágangi.[22]

Øssur Kjølbro, aðalskrivari í Heimamissiónini, hevur greitt arbeiðsbólkinum frá, at tey leggja stóran dent á, at øll tey, sum skulu vera leiðarar á legum í Nesvík, gjøgnumganga leiðbeiningina, og seta seg inn í hetta evnið sum heild. Tey vilja fegin tryggja sær, at eingin er leiðari á legum, uttan at kenna til hesi viðurskifti.

–Vit vita, at kynsligur ágangur kann fara fram allastaðni, og tí er hetta arbeiðið so týdningarmikið, sigur hann.

Seinastu 5 árini hava tey í Nesvík havt í miðal eitt mál um árið, har leiðarar hava varnast tekin, sum kundu bent á, at eitt barn hevur verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi. Hesi mál verða alt fyri eitt fráboðað Barnaverndartænastuni, sigur Øssur Kjølbro.

Eisini á Zarepta hava tey vegleiðingar til leguleiðarar og onnur starvsfólk, greiðir John Færø frá. Hann heldur tað vera týdningarmikið, at tað almenna slóðar vegin, og ger vegleiðingar, sum allir leiðarar fyri frítíðarvirksemi skulu fylgja.

Bæði á Zarepta og í Nesvík siga tey seg vera sinnað at taka lut í hesum arbeiði, sum tey halda vera ógvuliga týdningarmikið.

Magni Laksáfoss, sum hevur verið formaður í Føroya Skótaráð og hjá KFUM-skótunum í nógv ár, greiðir frá, at kynsligur ágangur og fyribyrging javnan er á breddanum innan skótarørsluna. Hann vísir eisini á, at skótarnir eru limir í Føroya Ungdómsráði, FUR, og at FUR leingi hevur havt ein dygdargóðan bókling um hetta evnið.[23] Magni Laksáfoss tekur undir við hugskotinum um at skipa skeið fyri leiðarar.

Eisini Føroya Ungdómsráð, FUR, sum áður hevur framleitt tilfar um kynsligan ágang, er sinnað at samstarva, tá ið talan er um hetta økið.

# Átak 7:

**Javnbjóðis møguleikar at siga frá og seta mørk – fólk við menningartarni og sálarligum avbjóðingum**

- Førleikamenning og undirvísing til starvsfólk. Framleiða hóskandi kunningar- og upplýsingartilfar.
- Mettur kostnaður: 100.000 krónur í 2016. 200.000 krónur í 2017. 50.000 krónur í 2018.
- Ábyrgd: Almannamálaráðið, í samstarvi við avvarðandi feløg og myndugleikar.

Fólk við serligum tørvi, t.d. fólk, sum hava menningartarn ella sálarligar avbjóðingar, eru fevnd av øllum átøkum í hesari ætlan.

Samstundis staðfesta vit, at tey í ávísum førum kunnu vera meira útsett, enn onnur.[24] Tey hava kanska ilt við at seta mørk – bæði egin mørk og mørkini hjá øðrum – og tað eiga tey at fáa høvi til at læra. Til hetta skulu skipast serlig skeið. Vit hava skyldu til at geva teimum serliga verju og hóskandi kunning. Sí eisini ST sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek, her av heimasíðuni hjá Almannamálaráðnum, www.amr.fo.[25]

Nógv av teimum, sum hava menningartarn, búgva á stovnum og/ella starvast á verkstøðum og starvsfólk eru tí um tey allan sólarringin. Henda støða kann gera, at tey eru meira útsett fyri at vera fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi. Førleikamenning og undirvísing av starvsfólkum, umframt tilfar og onnur kunning til teirra, sum hava menningartarn ella sálarligar avbjóðingar, eru týdningarmikil. Mælt verður til, at tey, sum starvast innan økið, verða útbúgvin/førleikament og at tey , sum hava menningartarn ella sálarligar avbjóðingar, eisini fáa neyðuga og serliga undirvísing, og læra at gerast betur før fyri at seta mørk, bæði hjá sær sjálvum og hjá øðrum. Undirvísing viðvíkjandi kyni, kenslum, kroppi og kærleika er týdningarmikil.

Tað er neyðugt at byrja við upplýsingarátøkum og møguliga einum evnisdegi fyri starvsfólki í Almannaverkinum. Tað eigur at vera ein skylda hjá leiðarum á stovnum, har tey, sum hava menningartarn ella sálarligar avbjóðingar, búgva og arbeiða, alla tíðina at førleikamenna síni starvsfólk og støðugt at upplýsa um hesar spurningar.

Tilfar skal framleiðast, til dømis er týdningarmikið at gera samskiftiskort til teirra, sum ikki hava mál.

[23] Bóklingurin: „Tá spælið verður spilt" kom út í august 2003. Bóklingurin snýr seg um kynsligan ágang móti børnum og ungum sum heild, um hvussu feløg kunnu arbeiða við fyribyrging, og um hvørjar skyldur einstaklingar og leiðarar í frítíðarfeløgum hava. 1000 eintøk av bóklinginum vórðu prentað.
[24] http://nfunorge.org
[25] http://www.amr.fo/arbeidsoki/brek/

## Ráðstevna

Tað er týdningarmikið at seta orð á sexualitet hjá teimum við menningartarni ella sálarligum avbjóðingum. Skotið verður upp, at ein ráðstevna verður hildin í 2017, sum varir í tveir dagar:

Dagur 1: Starvsfólk og myndugleikar.
Dagur 2: Brúkarar og avvarðandi.

Miðað skal vera eftir at fáa fólk úr grannalondunum at taka lut, bæði sum fyrilestrahaldarar og sum luttakarar annars.
Til ráðstevnuna skulu játtast 200.000 krónur.

## Tilfar

Í 2016 skal tilfar framleiðast, sum varpar ljós á hesi viðurskifti. Talan kann vera bæði um upprunaligt føroyskt tilfar og um útlendskt tilfar, sum verður týtt og lagað til føroysk viðurskifti.
Til hetta skulu játtast 100.000 krónur.
Í 2018 skal tilfarið eftirmetast og møguliga endurprentast.

# Átak 8:

**Kunning til foreldur/børn í Føroyum**

- Ein faldari skal gerast at senda øllum húsarhaldum.
- Mettur kostnaður: 80.000 krónur í 2017. 30.000 krónur í 2018.
- Ábyrgd: Almannamálaráðið, í samstarvi við Gigni og Barnaverndarstovu Føroya.

Ein faldari skal gerast og sendast øllum húsarhaldum í Føroyum. Hugskotið er, at onnur síðan vendir sær til børnini og hin síðan til foreldrini (...hvussu verji eg best børn míni móti kynsligum ágangi? Og hvat geri, tá skaðin er hendur? Hvar kann eg venda mær?).

Tað kostar, sambært Posta, umleið 20.000 krónur at bera ein faldara í øll hús í Føroyum. Harafturat kemur so framleiðsla: Tekstur, týðing, hugskot, sniðgeving, uppseting, prent.

Fyrireikandi arbeiðið verður gjørt í 2016. Faldarin verður framleiddur og borin út í 2017 og síðani endurskoðaður og møguliga uppafturprentaður í 2018.

Gigni ger eitt stórt fyribyrgingararbeiði, m.a. tá ið tað snýr seg um likamligan, sálarligan og kynsligan harðskap.

Á heimasíðuni hava tey nógv gott og upplýsandi tilfar, eisini um kynsligan ágang og annan harðskap.[26]

Hesin faldarin kann gerast í samstarvi við Barnaverndarstovu Føroya og Gigni.

Faldarin skal týðast til enskt og viðkomandi fremmandamál annars, soleiðis at eisini útlendsk foreldur í Føroyum hava møguleika at kunna seg um hesi viðurskifti.

[26] http://gigni.fo/index.asp?pID={F909CBB6-C6D3-4B3C-B468-6EAFD0CF1F68}

Heildarætlan um kynsligan ágang

# Barnaváttanir og fyrningarfreist

Umframt tey 8 átøkini omanfyri, hevur arbeiðsbólkurin eisini viðgjørt spurningin um barnaváttanir og fyrningarfreist í sambandi við mál um kynsligan ágang.

Týdningarmikið er, at støða verður tikin til endamálið við møguligum lógarbroytingum á hesum økjum, sum krevja politiska støðutakan og sum eru rættiliga prinsipiell.

Arbeiðsbólkurin hevur roynt at lýsa økini so væl sum gjørligt.

## Fyrningarfreistin í sambandi við kynsligan ágang

Rættarstøðan í Føroyum í dag er, at fyrningarfreistin fyri mál, sum snúgva seg um samlegu ella annað kynsligt samband við barn undir 15 ár, er 10 ár frá tí degi, at barnið fyllir 18 ár. Um talan er um grovar umstøður, ella um barnið er undir 12 ár, er fyrningarfreistin 15 ár frá tí degi, at barnið fyllir 18 ár. Tað vil siga, at fyrningarfreistin í minsta lagi er 10 ár og í mesta lagi 33 ár. Alt eftir, nær lógarbrotið er framt.

Hesar fyrningarfreistir eru millum tær longstu í revsilógini. Orsøkirnar til, at ein fyrningarfreist er ásett fyri øll revsimál, eru fleiri. Týdningarmest er tó atlitið at rættartrygdini og møguleikin hjá tí ákærda at verja seg. Próvtilfar broytist sum tíðin fer, t.d. vera summi prógv burtur ella oyðiløgd og kann hetta vera til skaða fyri tann ákærda, sum ikki fær vart seg. Hetta er serliga galdandi í teimum førum, har eingi teknisk prógv eru. Minnið hjá fólki broytist eisini sum tíðin líður. Okkurt verður gloymt, annað verður lagt afturat, og hetta kann gera tað sera trupult hjá tí ákærda at verja seg.

Tað almenna hevur eisini ein áhuga í ikki at áleggja størri revsing, enn neyðugt. Tess longri tíð gongur, frá tí at lógarbrotið varð framt, tess minni verður fyribyrgjandi virknaðurin av revsingini. Endamálið at steðga lógarbrotum sum skjótast (t.d. fyribyrgja, at ein brotsmaður ger seg inn á fleiri børn), minkar eisini burtur sum tíðin líður.

Í sambandi við eftirkanningina av einum máli kann staðfestast, at jú longri tíð fráliðin er, truplari verður at eftirkanna málið og meira orka má nýtast fyri at finna haldgóð prógv. Gomul mál taka orku frá nýggjari málum, har størri møguleiki er at fáa ein dóm.

Siðamisbrot móti børnum eru nøkur av teimum álvarsligastu brotsverkunum sambært revsilógini. Tað er ikki óvanligt, at lógarbrotið verður framt av einum av teimum nærmastu hjá barninum ella tí unga. Hetta ger tað serliga torført hjá barninum ella tí unga at siga frá. Harumframt eru tey ofta traumatiserað av hendingunum, soleiðis at einki verður sagt um misbrotið, fyrrenn barnið er blivið vaksið.

Hetta er eisini orsøkin til, at serligar fyrningarreglur eru viðvíkjandi siðamisbrotum móti børnum, soleiðis at fyrningarfreistin fyri hesi misbrot ikki byrjar at renna, fyrrenn tann dagin barnið fyllir 18 ár. Hetta verður kallað útsett fyrning. Við hesum varð mett, at góðir møguleikar vóru at ábyrgja gerningsmannin fyri sjálvt sera gomul brot á revsilógina. Fyrningarfreistin fyri siðamisbrot er millum tær longstu í revsilógini.

Trupulleikin við siðamisbrotum er, at í flestu førum eru ikki onnur vitni til staðar, enn órættaði/a og gerningsmaðurin. Tá ið misbrotið verður meldað so seint, eru harafturat sjáldan teknisk prógv, sum DNA, fingraprent ella sjónligir skaðar. Hetta ger, at tað er sera torført at eftirkanna gomul mál, og tað er eisini torført hjá tí ákærda at verja seg, tí at tey vitni, sum møguliga kundu prógva hansara fráveru, ikki longur minnast, hvat hendi.

Próvgrundarlagið verður tí grunt og skirvisligt.

Sum er, ger løgreglan nógv burturúr at tosa við órættaða/u, hóast eitt mál er fyrnað og frágreiðing verður eisini gjørd í málinum. Løgreglan kallar eisini viðkomandi, sum er undir illgruna, inn til eina samrøðu, har tað verður gjørt greitt fyri hesum, at løgreglan kennir til málið og fer at gera skjótt av, um tey fáa vitan um nýggj mál.

Føroya Landfúti ger greitt, at um fyrningin verður avtikin, fara tey gomlu málini at taka nógva orku frá nýggjari málum, samstundis sum líkindi til at fáa ein dóm, eru sera lítil. Fútin metir hetta vera sera óheppið fyri órættaða/u, sum kann fáa kensluna av, at rættarskipanin ikki trýr uppá viðkomandi.

Tað hevur verið ført fram, at Noreg hevur avtikið fyrningina av siðamisbrotum. Hetta er ikki heilt rætt.

Í Noregi verða siðamisbrot býtt upp í tríggjar bólkar, í mun til hvussu álvarsligt brotið er. Hesir bólkar eru:

- Seksuell omgang: Hetta umfatar tey mest álvarsligu brotini, sum samlega og samlegu líknandi samband.
- Seksuell handling: Hetta er handlan uttaná og innanfyri klæðini.
- Seksuelt krenkende atferd: Her er einki beinleiðis kropsligt samband.

Noreg hevur, sum tað einasta norðurlandið, avtikið fyrningina fyri tey álvarsligastu lógarbrotini, so sum samlegu og samleguĺíknandi samband við børn og ung. Øll hini lógarbrotini, so sum at føla uppá barnið ella tann unga uttaná og innanfyri klæðini, fyrna eftir teimum vanligu fyrningarreglunum. Fyrningarfreistin fyri hesi lógarbrot er millum 2 og 10 ár, roknað frá tí degi, lógarbrotið endaði, og alt eftir, hvussu álvarsligt brotið er. Í hesum førum er sostatt ikki talan um, at fyrningin er útsett, til órættaði/a fyllir 18 ár.

Orðaskiftið um fyrning hevur verið tað sama í Danmark og Noregi, og bæði londini eru grundleggjandi samd um fyrimunir og vansar við at taka av fyrning fyri siðamisbrot móti børnum. Í Danmark verður staðiliga mælt frá at avtaka fyrningarfreistina, tí at rættartrygdin kemur í vanda, umframt at hesi mál eru sera orkukrevjandi og kostnaðarmikil í mun til væntaðar framtíðar dómar.

Tá ið lógaruppskotið um avtøku av fyrningarfreistini varð sent til ummælis í Noregi, vóru flestu ummælispartarnir ímóti uppskotinum. Teir løgdu dent á, at hetta var ein trupulleiki í mun til rættartrygdina, at hesi mál eru ógvuliga orkukrevjandi og fóru at taka orku frá teimum nýggjaru málunum og at tann útsetta fyrningin gav góðar møguleikar at ábyrgja gerningsmannin, sjálvt í gomlum málum.

Minnilutin legði hinvegin dent á rættarkensluna hjá órættaða/u og á at børn, sum eru fyri siðamisbroti eru ofta traumatiserað og hava torført við at siga frá.
Norska Justis- og Beredskapsdepartementet valdi at leggja dent á atlitið at órættaða/u.

Norska lógarbroytingin er enn so nýggj, og tað fer at ganga rúm tíð, áðrenn tað kann staðfestast, hvussu henda broyting fer at hilnast, og um tað fer at bera til at fáa dóm í hesum gomlu málunum.

Tað er tann politiska skipanin, sum skal taka støðu til, um fyrningarfreistin skal avtakast fyri siðamisbrot. Í hesum sambandi er tað týdningarmikið at hava í huga, at hetta er eitt álvarsligt inntriv í rættartrygdina. Harafturat eigur at havast í huga, at tað krevur sera nógva orku hjá løgregluni at eftirkanna ógvuliga gomul mál. Tá orkan hjá løgregluni er avmarkað, er eisini vandi fyri, at hetta kann ávirka eftirkanningina av yngri málum. Tað eigur eisini at verða væl umhugsað, hvat endamálið við at avtaka fyrningarfreistina er, og um hetta møguliga kann røkkast uppá aðrar mátar.

Nevnast kann, at Lanzarotesáttmálin, sí omanfyri á síðu 7, mælir til, at fyrningarfreistin verður ásett soleiðis, at „freistin skal vera so mikið long, at neyðug tíð er til at byrja rættarmál, eftir at ofrið er komið til myndugleika aldur".

Rættarstøðan í Føroyum má sigast at vera í tráð við hetta tilmælið.

## Barnaváttanir

Ein barnaváttan er eitt serligt slag av revsiváttan. Hendan revsiváttan hevur upplýsingar um brot á revsilógina, sum viðvíkja siðamisbrotum móti børnum undir 15 ár. Í váttanini síggjast upplýsingar um dómar, bøtur og ákærufrágang við fylgistreytum.

Fylgistreytir kunnu vera eftirlit, útbúgving og hjálpiatgerðir. Persónurin skal hava verið ákærdur fyri siðamisbrot mótvegis børnum, fyri at tað skal síggjast í barnaváttanini. Tað vil siga, at tað á barnaváttanini ikki sæst, um ein persónur til dømis er undir illgruna fyri siðamisbrot mótvegis børnum.

Í barnaváttanini síggjast fylgjandi revsilógarbrot:
- Blóðskemd, samlega ella annað kynsligt samband við børn undir 15 ár.
- Útbreiðsla ella varðveitsla av barnapornografi.
- Blúnisbrot mótvegis børnum undir 15 ár.

Upplýsingar um lógarbrotið síggjast í minst 10 ár, aftaná at dómur er fallin, ella viðkomandi er leyslatin.

Dómar fyri ávís siðamisbrot verða ikki strikaðir, fyrrenn 20 ár aftaná, at viðkomandi er leyslatin, meðan tey álvarsligastu siðamisbrotini kunnu síggjast, til viðkomandi er 80 ár, og í summum førum til viðkomandi doyr.

Barnaváttan kann ikki gevast persóninum sjálvum, men kann einans latast almennum myndugleikum ella privatum feløgum.

Viðkomandi persónur skal altíð geva skrivligt samtykki til, at ein barnaváttan kann útvegast.

Um ein skipan við barnaváttanum skal setast í verk í Føroyum, krevur hetta í fyrstu syftu, at ein lóggáva verður gjørd, har kravt verður, at barnaváttanir skulu innheintast í sambandi við setan av fólki í ávís størv.
Tað er Mentamálaráðið, sum varðar av at gera eitt tílíkt lógaruppskot.

Fyri, at løgreglan í Føroyum skal fáa heimild til at skriva út bar-

naváttanir krevst, at lóg nr. 429 af 31. maj 2000 om behandling af personsoplysninger verður sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan „for rigsmyndighedernes behandling af oplysninger med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger", umframt at bekendtgørelse nr. 881 af 4. juli 2014 om behandling af personsoplysninger i Det Centrale Kriminalregister (Kriminalregistret) verður sett í gildi.

Løgmansskrivstovan varðar av hesum parti av málinum.

Í løtuni verður bíðað eftir einum uppskoti frá dønum til kongaliga fyriskipan um gildiskomu fyri ríkismyndugleikarnar av lov nr. 429 af 31 maj. 2000 om behandling af personsoplysninger. Tað er upp til ta politisku skipanina at taka støðu til, um ein skipan við barnaváttanum skal setast í verk í Føroyum. Mælt verður til, at fyrimunir og vansar verða nágreiniliga kannað, áðrenn ein slík skipan verður sett í verk, og at tað er greitt, hvat endamálið við henni er. Mælt verður eisini til at kanna, um hetta endamál kann røkkast á aðrar mátar.

# Eftirmeting av átøkunum

Heildarætlanin er ikki ein endalig loysn, men eitt livandi skjal við átøkum, sum verða sett í verk so hvørt.
Eins og Harðskaparætlanin skal henda Heildarætlan um kynsligan ágang eftirmetast, og í tí sambandi tillagast og, um neyðugt, broytast samsvarandi tí tørvi, sum er í dagsins samfelag. Tað, sum riggar í ár, kann vera neyðugt at broyta næsta ár. Møguliga fer tað eisini at vísa seg, at neyðugt gerst at leggja fleiri átøk afturat teimum verandi.
Heildarætlanin um harðskap varð sett til at vara í eitt fimm ára tíðarskeið, sum rennur út seinast í 2016. Hon skal tí eftirmetast í seinasta lagi tá, og arbeiðsbólkurin mælir til, at báðar heildarætlanirnar verða eftirmettar saman og samstundis.

# Útgangur

Løgtingið heitti í uppskotinum til samtyktar á landsstýrið um at gera eina heildarætlan um kynsligan ágang. Í uppskotinum varð skotið upp, at arbeiðið við Harðskaparætlanini varð nýtt sum leistur at leggja hetta arbeiðið til rættis eftir.
Hetta er gjørt á tann hátt, at vit nú hava tvær heildarætlanir – Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum OG Heildarætlan um kynsligan ágang – sum eru samantvinnaðar, og sum skulu síggjast sum ein heild. Hetta verður eisini undirstrikað á tann hátt, at Harðskaparætlanin er endurprentað saman við nýggju ætlanini. Báðar ætlanirnar eru sostatt ein og sami prentlutur.

Arbeiðið varð gjørt í Almannamálaráðnum saman við umboðum úr Mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, av Løgmansskrivstovuni og úr Kommunufelagnum.

Arbeiðsbólkurin, sum settur varð at gera hesa ætlan, hevur lagt seg eftir at lýsa viðurskiftini út í æsir og at spyrja seg fyri hjá teimum, sum hava størsta kunnleikan innan økið.
Vit takka fyri beinasemi og góð ráð.

Burturúr hesari leitan eftir kunning, eru sprottin tey 8 átøkini, ið Heildarætlanin um kynsligan ágang fevnir um.

Í størst møguligan mun hevur arbeiðsbólkurin síðani viðgjørt og tillagað tey 8 átøkini saman við viðkomandi persónum, stovnum og felagsskapum.

Tað verður ikki alt fleytir, ið tyril kemur í! Hetta veit arbeiðsbólkurin fullvæl, og ásannar samstundis, at henda heildarætlan er ikki loysnin á øllum trupulleikum.

Tó eru vit sannførd um, at tey 8 átøkini – verða tey framd óskerd – fara at bøta munandi um støðuna viðvíkjandi kynsligum ágangi í Føroyum.

*Elin Winther Poulsen*
*Gudrun Mortansdóttir Nolsøe*
*Oddbjørg Balle*
*Hildur Patursson*
*Símun J. Hansen*

# Hesi hava givið arbeiðsbólkinum sítt íkast

Javni
MBF
Barnabati
ÍSF
Løgreglufólk
Fútin
Verjuadvokatur
Gigni
Grúgvan
Føroya Lærarafelag
Føroya Pedagogfelag

Skúlaleiðari
KRIS
Sálarfrøðingar á Sernámi
Sexologur/menningartarn
Barnanna Umboðsmaður, LUM
Dátueftirlitið
SSP
Leguhúsið í Nesvík
Zarepta
Skótar
Kriminalforsorgin

Tittul: Heildarætlan um kynsligan ágang
Útgivið: 19. mars 2015
Útgevari: Almannamálaráðið
Útgáva, 1. upplag, 300 eintøk
Uppsetan: Sendistovan
Prent: Prenta
Forsíðumynd: Sloyfa ímóti kynsligum ágangi (sexual exploitation)
Talgild útgáva (PDF fíla) kann takast niður av heimasíðuni www.amr.fo
Um tilfar í hesi frágreiðing verður endurgivið, skal vísast til útgávuna